# Vinna

## Starvsfólka NemID

### Um NemID

**Tryggari Netbanki við NemID**
Trygdin í tínum netbanka verður uppstigað, við at NemID skipanin verður tikin í nýtslu. Hetta fyri at fylgja trygdarleiðbeiningunum, ið Finansrådet hevur fyri netbankar. Netbankin verður tryggari, tí umframt atgongdarkotuna skalt tú eisini hava títt lyklakort hjá tær, tá ið fíggjarligu viðurskiftini skulu avgreiðast.

**Skjótari og lættari atgongd til Netbankan**
Tað, at trygdin verður betri, broytir ikki Netbankan sjálvan, men tó verður mannagongdin við innritan broytt til NemID. Frameftir verður Netbankin ikki tengdur at eini serstakari teldu, og tú kanst rita inn uttan mun til tíð og stað.

**Starvsfólka NemID til vinnukundar**
Av tekniskum ávum verða vinnukundar ikki við í sjálvvirkandi hópstovningini av NemID. Hetta fyri at skilja privatviðurskifti frá vinnuviðurskiftum í nýggju trygdarloysnini.

*Tilgongd*
Peningastovnarnir seta seg í samband við fyritøkurnar at fáa viðurskiftini upp á pláss. Í hesum liggur, at fyritøkan skal undirskriva

- NemID til starvsfólk
- Íbindingaravtalu/NemID reglur
- Brúkaraavtala/-ur
- Samtykki

Tá neyðugu skjølini eru undirskrivaði og latin peningastovnunum, kunnu Starvsfólka NemID verða stovnaði.

*Skiftistíð*
20. apríl 2015 broytist innritingarsíðan í netbankanum til NemID. Á innritingarsíðuni verður tó umframt leinkjuna NemID innritan, eisini leinkjan Gomul innritan, sum er núverandi innritingarloysn.

Í tíðarskeiðinum, til Starvsfólka NemID er stovnað, er neyðugt at nýta leinkjuna Gomul innritan

Peningastovnarnir byrja at stovna Starvsfólka NemID í mai 2015.

**Fulltrúir og prokura**
Broytingin til Starvsfólka NemID ávirkar ikki fulltrúir og prokura-rættindir, ið eru skrásettar í sjálvgreiðslu-/íbindingaravtaluni.

**Gomul innritan verður niðurløgd**
Verandi innritingarloysn í Netbankanum verður niðurløgd. Seinasta freist hjá fyritøkum at flyta yvir til nýggju innritingarloysnina er 1. september 2015.

Peningastovnarnir vilja í samráði við fyritøkur skipa so fyri, at flytingin er framd áðrenn hesa evstufreist.